# Oljuhavnin "Kongahavn" vígd og tikin í nýtslu

**Í vígslurøðu síni, segði formaðurin í havnanevndini, Kári P. Højgaard, at nógvir leikir eru í longum talvi, og soleiðis var eisini við kappingini um, hvar útgerðarhavnin skuldi vera. - Her var stórur spenningur heilt til málstrikuna um, hvør fór at vinna kappingina, og stór var frøin, tá ið tíðindini bórust um, at oljufeløgini høvdu valt Runavíkar havn, segði hann.**



*Í samband við vígsluna vórðu eisini gávur handaðar*

*Her síggja vit skiparan á Lómi, Amaliar Haraldsen (tv.), við blómum. Á myndini eru eisini stjórin í Skipafelag Føroya, formaðurin í havnanevndini, Kári P. Højgaard og býráðsformaðurin, Rodmundur Nielsen*

*Amaliar, sum er ættaður úr Elduvík, men býr í Havn, hevur siglt hjá Skipafelag Føroya í 30 ár*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

HAVNAVÍGSLA
*Vilmund Jacobsen*

Á samkomu seinnapartin hósdagin varð nýggja havnalagið í Runavíkar kommunu vígt og alment tikið í nýtslu. Hornatónleikur, kaffi undir opnum himli og ein fitt mannamúgva settu dám á hesa løtu. Fyrsta skipið, sum legði at bryggjuni, tá ið Kongshavn, ið er heitið á nýggju havnini, var vígd, var Lómur hjá Skipafelag Føroya.

Tað var Kári P. Højgaard, býráðslimur og formaður í havnanevndini hjá Runavíkar kommunu, sum fekk heiðurin at halda røðu og alment boða frá, at nú var Kongshavn vígd og alment tikin í nýtslu.

### Øktir møguleikar

Kári segði, at endiliga upprann tann dagur, sum fólk í spenningi hava bíðað eftir.

– Í dag verður nýggja havnalagið her undir posthúsinum, sum býráðið hevur samtykt skal eita Kongshavn, alment tikið í nýtslu. Við hesum verða møguleikarnir at avgreiða ta stóru skipaferðslu, sum nýtir Skálafjørðin og Runavíkar havn, munandi betraðir.

Hann segði, at við nýggja havnalagnum fær kommunan 100 metrar av atløgusíðu við 12 metra dýpi og umleið 9000 fermetrar av lendi aftrat at ráða yvir.

– Tað eru ivaleyst mong sum hugsa, at nú er nóg mikið gjørt á havnalagnum. Men kemur virksemið at økjast munandi framyvir, síggja vit fram til, at havnaøkið framhaldandi verður víðkað eftir tørvi, soleiðis at Runavíkar havn kann taka tær avbjóðingar, sum standa fyri framman og veita teimum, sum brúka havnina – skipum og viðskiftafólki annars – eina góða tænastu, segði Kári.

### Stór var frøin

Hann vísti á, at nógvir leikir eru í longum talvi, og soleiðis var eisini við kappingini um, hvar útgerðarhavnin skuldi vera.

– Her var stórur spenningur heilt til málstrikuna um, hvør fór at vinna kappingina um útgerðarhavnina, og stór var frøin, tá ið tíðindini bórust um, at oljufeløgini høvdu valt Runavíkar havn. Atlantic Supply Base og Skipafelag Føroya høvdu vunnið kappingina um at veita tænastur í samband við tær fyrstu átta boringarnar í leitiskeiðnum.

Kári segði, at rættiliga nógv virksemi var á havnalagnum í fjør, tá ið tær tríggjar fyrstu boringarnar fóru fram.

– Á eftirmetingarfundi vóru menn samdir um, at hóast tað mangan var trongligt við bryggjukantin, hevði arbeiði gingið fyrimyndarligt. Menn sóu fram til, at størri atløgusíða fekst, og at havnaøkið varð víðkað. Tíverri varð olja ikki funnin, har menn mettu, at bestu møguleikarnir vóru, men oljan varð funnin í djúpri. Hetta førdi við sær, at Agip útsetti sína leitiboring. Tí verður eingin oljuaktivitetur í ár, men komandi ár verður aftur lív í á Atlantic Supply Base, segði hann.

### Góðar fyritreytir

– Vit møta teimum avbjóðingum, sum liggja fyri framman, við spenningi og treysti. Seinasta ár tóku Skála kommuna og Runavíkar kommuna avgerð um samanlegging. Kommunurnar hava í felag eitt stórt og gott havnalag við beding, turrdokk og skipasmiðju.

Kári segði, at í Eysturoynni finst eitt dugnaligt og fjølbroytt vinnulív og tænastuvirksemi, sum bjóðar seg fram í altjóða høpi og við góðum samferðsluviðurskiftum, eru fyritreytirnar tær bestu at liva upp til treytirnar, ið settar verða.

– Vit skulu framhaldandi í leitiskeiðnum prógva, at tað var rætta avgerðin, ið varð tikin, tá ið vit vórðu valdir út til hesa týdningarmiklu avbjóðing. Vit vóna, at møguliga komandi oljuævintýrið kemur at verða kommunu, oynni, landi og fólki okkara at gagni.

Formaðurin í havnanevndini endurtók, at nógv virksemi og ferðsla er um

Runavíkar havn, og her verða stórar mongdir at farmi - tó mest fiski - upp- og avskipaðar.

– Heilsufrøðiligu krøvini til handfaring av matvørum eru strong, og tí ætla vit at umskipa havnalagið í næstum, soleiðis at fiskur og annar farmur verður meira atskilt.

*Kári P. Højgaard á røðarapallinum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*





*Her leggur Lómur, sum fyrsta skipið eftir vígsluna, til bryggju*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



Hann vísti á, at fiskivinnan hevur verið, er og verður framhaldandi lívsgrundarlagið undir lokala samfelagnum á staðnum, eins væl og í øllum tí føroyska samfelagnum. Tískil skal fiskivinnan eisini framyvir fáa bestu sømdir at virka undir.

– Ítøkilig ætlan er um at sambinda havnaløgini við einum vegi inn á Bakka.

Vónandi verður hesin vegur liðugur um ikki so langa tíð, so hann kann lætta nakað um tungu ferðsluna, sum koyrir gjøgnum býin.

### Ynskir um framtíðina

Men hvørji framtíðarynskir hevur so formaðurin í havnanevndini?

– Jú, í fyrsta lagi er ynskiligt, at vit fáa eina "bip-støð" her sum skjótast, soleiðis at skip sleppa undan at fara á Kollafjørð at kanna lastina. Í øðrum lagi, at oljuvinnan og fiskivinnan kunnu arbeiða hond í hond, so kappingin millum vinnurnar kann verða við til at menna báðar partar. Í triðja lagi, at farmur til og úr Eysturoy í størri mun enn nú verður avgreiddur her á staðnum heldur enn í bili eftir oyggj. Í fjórða lagi, at ferðamannaskip vitja havnaløg uttanfyri Tórshavn, og at okkurt eisini finnur vegin inn á Skálafjørðin. Í fimta lagi ynski eg at uppliva, at havnalagið verður ein samanhangandi eind, úr Saltangará og inn á Bakka.

Kári nýtti eisini høvi at takka øllum, sum hava viðvirka til, at nýggja havnalagið nú er vorðið veruleiki. Eisini takkaði hann havnameistara og havnaumsjónini, sum dagliga starvast á havnalagnum og hevur ábyrgdina av, at alt virksemið verður framt undir skipaðum viðurskiftum.

– Tøkk fyri gott samstarv og tolsemi, tí mangan hevur verið trongligt við atløgusíðuna, og menn hava verið noyddir at laga seg eftir umstøðunum. Eisini takkaði Kári Skipafelag Føroya fyri, at felagið vildi lata Lóm verða fyrsta skipið, sum legði at Kongshavn – og hornorkestrinum fyri, at tey altíð eru til reiðar at seta sín dám á merkisdagar, tá ið heitt verður á tey.

At enda ynskti formaðurin í havnanevndini Harrans signing yvir staðin og havnalagið.

– Tað er mín vón, at henda íløga kemur at verða við til at menna býin og fíggjarliga at verða eitt gott íkast framyvir, segði Kári P. Højgaard.



*Væl av fólki var samankomið á Kongshavn hósdagin, tá ið oljuhavnin varð vígd og alment tikin í nýtslu*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# 10 skúlanæmingar arbeiða á Norðís Seafood



*Norðís Seafood er eitt gott arbeiðspláss, og summi koma langan veg fyri at arbeiða á fiskavirkinum á Eiði.*
*Í løtuni eru eisini 10 skúlanæmingar til arbeiðis á virkinum*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Nú skúlarnir eru í summarfrí, arbeiða 10 skúlanæmingar á Norðís Seafood á Eiði. Hetta eru næmingar, sum eru 15 ára gamlir og eldri.

Á Eiði siga tey, at virkið plagar at hava næmingar til arbeiðis um sumrarnar, men vanliga hava hetta verið næmingar, sum eru lidnir við 10. flokk.

- Í summar hava vit so eisini tikið yngri næmingar til arbeiðis.

### Mest upsi

Sum skilst, hevur nógv fiskaarbeiði verið á Eiði í summar, og serliga er tað upsi, sum er farin gjøgnum maskinurnar. Virkið hevur tó eisini arbeitt nakað av hýsu.

Eini 60 fólk eru vanliga til arbeiðis á Norðís Seafood, tá ið mest er at gera, og nú hevur virkið so hesar 10 skúlanæmingarnar aftrat.

- Her arbeiða fólk úr nógvum ymiskum bygdum, og onkur koyrir langan veg fyri at koma norður higar til arbeiðis. Vit hava t.d. fólk úr Hósvík, Kollafirði og onkur kemur eisini úr Havn, siga tey á Eiði.

### Ikki góðkend

Meginpartin av ráfiskinum keypir Norðís Seafood á uppboðssølu. Onkur last verður keypt beinleiðis, men um sjálvan bryggjukantin á Eiði kemur at kalla eingin fiskur, tí Eiði er ikki góðkend landingarhavn.

# Dagrøkt, frítíðarskúli og útibarnagarður

KOMMUNUTÍÐINDI
*Vilmund Jacobsen*

Í frágreiðingini til roknskapin hjá Nes kommunu, verður sagt, at eftirspurningurin eftir plássum í dagrøktini øktist í 2001; tí valdi kommunan at keypa gamla B68-húsið, sum nú rúmar spælistovu hjá dagrøktini, frítíðarskúla og útibarnagarði.

### Býta útreiðslurnar

Eftir dagrøktarskipanini, rindar kommunan nú 70% av útreiðslunum til barnaansingina og foreldrini 30%. Tað er Almanna-og Heilsumálastýrið, sum hevur ábyrgdina av almannaveitingunum.

Við útibarnagarðinum, er talið av børnum,sum verða ansað, eini 125.

# Kirkjugarður, vegir og asfaltering

KOMMUNUTÍÐINDI
*Vilmund Jacobsen*

Í 2001 víðkaði Nes kommuna nýggja kirkjugarðin á Nesi, og hetta arbeiði er liðugt. Vegur er eisini gjørdur úr kirkjuvegnum og norður um nýggja kirkjugarðin.

Kommunan hevur eisini gjørt eina vegaføring í samband við útstykkingina millum Heygarnar og Gadd. Tá ið arbeiði við kloakk, vatni og el er liðugt, eru fyrstu grundstykkini frá Gadd og norðureftir klár.

Á Brekkukletti er vegurin longdur suðureftir.

### Asfaltering

Nes kommuna fyrireikaði í 2001 arbeiðini at asfaltera alt havnaøkið, og hetta arbeiði byrjaði tíðliga í hesum árinum.

Tey, sum dagliga ferðast á havnalagnum, hava sæð, at her er nógv hent í seinastuni. Her er vorðið nossligari og arbeiðsligari hjá tí nógva virkseminum, sum er á havnaøkinum.



-tað loysir seg!